LÆRARABÓK

Jón Magnus Joensen

# KRISTNI 5

NÁM

2012

Kristni 5. Kristnikunnleiki. Lærarabók
© Nám
Høvundur: Jón Magnus Joensen
Tekningar: Hannis Egholm

# Innihald

Um Kristni 5 . . . . . . . . . . 4
Kristni 5 – lærarabók . . . . . . . . . . 6
Kristni 5 – nømingabók . . . . . . . . . . 7
Kristni 5 – arbeiðsbók . . . . . . . . . . 8
1. Skapanarverkið og eg . . . . . . . . . . 8
2. Fólkakirkjan . . . . . . . . . . 18
3. Gud faðir . . . . . . . . . . 21
Sangir . . . . . . . . . . 25
Hentar slóðir . . . . . . . . . . 35

# Um Kristni 5

*Kristni 5* er bókaheild til kristnikunnleika í 5. flokki. Heildin fevnir um næmingabók, arbeiðsbók og lærarabók, og uppgávur og spøl á www.snar.fo. Bókaheildin byggir á námsætlanina í kristnikunnleika og er viðgjørd av gudfrøðingum og lærarum.

Í námsætlanini eru tey fimm kjarnuøkini í lærugreinini hesi:
- Átrúnaður, lívsfatan og siðfrøði
- Týðandi bíbliutekstir og frásagnir
- Høvuðstættir í kristnari trúgv, list og mentan í søguligum og nútíðar høpi
- Kirkjusøga
- Heimsátrúnaðir og lívsfatanir

## Ávegismál eftir 6. flokk:

**Átrúnaður, lívsfatan og siðfrøði**

Næmingurin dugir:
1. at greiða frá almennum tilveruspurningum, eisini í sambandi við lisnan tekst
2. at samtala um faklig evni og hugtøk í kristindóminum
3. at samtala um átrúnaðarligan og siðalagsligan atburð
4. at samtala um at vera menniskja
5. at lýsa fyrimyndir og virði
6. at lýsa sambandið millum menniskju og náttúru.

**Týðandi bíbliutekstir og frásagnir**

Næmingurin dugir:
1. at tulka úrvaldar hendingar og frásagnir í Gamla og Nýggja testamenti
2. at leita og finna viðkomandi tekstir í Bíbliuni
3. at síggja mun á ymiskum tekstsløgum í Bíbliuni
4. at greiða frá sambandinum millum Gamla og Nýggja testamenti
5. at vísa á bíbilskar frásagnir í list og mentan.

**Høvuðstættirnir í kristnari trúgv, list og**

Næmingurin dugir:
1. at greiða frá høvuðstættunum í kristindóminum
2. at greiða frá søguliga uppruna kristindómsins, og hvussu boðskapurin varð borin í Evropa og Føroyum
3. at greiða frá sambandinum millum innrætting, list og skipan í kirkjuni
4. at greiða frá týdninginum av høgtíðum, halgidøgum og halgisiðum
5. at samtala um súmbol og listarlig verk, ið vísa, hvat kristindómur er
6. at viðgera nakrar sálmar, sangir umframt tónleik við átrúnaðarligum innihaldi.

**Kirkjusøga**

Næmingurin dugir:
1. at greiða frá kirkjusøguni á staðnum
2. at greiða frá øðrum kristnum samkomum á staðnum
3. at greiða frá missión og hjálpararbeiði í øðrum londum.

**Heimsátrúnaðir og lívsáskoðanir**

Næmingurin dugir:

1. at viðgera og greiða frá heimsátrúnaði og øðrum átrúnaðarligum siðum við tolsemi og virðing
2. at greiða frá og lýsa átrúnaðarligar rørslur, felagsskapir og lívsfatanir í heiminum við tolsemi og virðing í einum fjølbroyttum og fólkaræðisligum samfelagi.

*Sí annars www.namsaetlanir.net*

# Kristni 5 – lærarabók

Lærarabókin er skipað soleiðis, at tað skal vera lætt hjá læraranum at leita fram júst tað, hann hevur brúk fyri. Viðmerkt er týðiliga, hvat evni og hvørja síðu í næmingabókini sipað verður til.

**Hvat er kapittulin um**
Fremst í hvørjum kapitli í næmingabókini: *Kristni 5* er eitt tittulblað, sum lýsir evnið. Í lærarabókini eru hugskot til samrøðu í flokkinum. Øll tittulbløðini í næmingabókini eru á Snar og kunnu tískil vísast við sjónvørpu.

**Sálmar og sangir**
Til allar kapitlar verður víst til viðkomandi sálmar og sangir. Numrini til sálmarnar vísa til Sálmabók Føroya kirkju. Sangirnir, ið verður víst til, standa aftast í lærarabókini.

**Meira um evnið**
Tað, sum hevur týdning fyri innihaldið í kapitlinum verður viðgjørt undir hesum punkti. Komið verður stutt inn á bíbliutekst, útleggingar, umstrídd evni, fakta o.a.

**Hugskot**
Hugskot til hvussu undirvísingin kann skipast eru til allar síður í næmingabókini. Nøkur hugskot eru samrøðuevni, onnur vísa læraranum, hvussu undirvísingin kann gerast meira spennandi, og uppaftur onnur eru større og minni undirvísingarupplegg. Ætlanin er ikki, at lærarin nýtir øll hugskotini í lærarabókini.

**Aktivitetir**
Víst verður til spøl, bólkaarbeiði, tvørfakligt arbeiði, uppgávur o.a. sum kunnu gera undirvísingina meira viðkomandi og fjølbroytta.

Av og á verður rátt til, at flokkurin ger ein lítlan leik. Her er ikki hugsað um at gera so nógv burturúr við búnum o.ø. Helst skal leikurin verða framførdur sama tíma. Royn og fá flestu næmingar við. Tey, ið ikki hava nakran aktivan leiklut kunnu t.d. vera djór, fuglar, einglar, steinar, blómur o.s.fr.

Skapandi arbeiði tekur tíð, og lærarin má tí viga undirvísingina soleiðis, sum hann heldur vera best fyri at røkka ávegismálunum í námsætlanini. Tað ber ikki til at nýta øll **hugskotini** og allar **aktivitetirnar,** sum vera nevndir í lærarabókini, tí til tað er skúlaárið ov stutt.

**Snar**
Bókaheildin hevur eina síðu á Snar, sum støðugt verður útbygd. Síðan er á so nevndu bókahillini. Beinleiðis slóð til síðuna: www.snar.fo/456

# Kristni 5 – næmingabók

Fremst í næmingabókini er ein stutt lýsing av Kristni 5.




*Les tekstin fyri næmingunum og tosið um bókina. Greið næmingunum frá, hvussu bókin er uppbygd. Hyggið at innihaldsyvirlitinum og prátið um ymisku evnini, tit skulu viðgera hetta árið. Síðan kann eisini vísast á foreldrafundi, tá greiðast skal frá ársætlanini.*

**Tittulbløð**
Tá byrjað verður upp á ein kapittul, er ætlanin, at næmingar og lærari tosa um tað, sum tey fara at lesa og læra tær næstu vikurnar. Tilfarið gerst kent, og tað gerst lættari at tríva aftur í aftur seinni í undirvísingargongdini.

**Elsa og Livar**
Fyri at gera bókina meira viðkomandi fyri næmingin, so eru tvey børn, Elsa og Livar, við í næmingabókini.

**Samrøðukassar**
Á flest øllum síðum eru samrøðukassar, ið leggja upp til samrøður. Tað er av alstórum týdningi, at øll í flokkinum kenna seg trygg, soleiðis at samrøðan gongur væl. Einki eitur tí „tápuligir spurningar“ ella „tápulig svar“. Einans svar og spurningar. Tað ræður um at undrast, og at seta orð á lívsspurningar.

**Samandráttur**
Hvør kapittul endar við einum samandrátti fyri at minna á, eftirmeta og taka samanum.

# Kristni 5 – arbeiðsbók




Arbeiðsbókin kann verða brúkt hvønn tíma. Uppgávurnar eru gjørdar soleiðis, at næmingarnir kunnu arbeiða sjálvstøðugt. Men gott er, um arbeiðið hjá næmingunum av og á verður eftirmett.

# 1. Skapanarverkið og eg




**Tittulblað**
Spyr næmingarnar, um teir minnast tað, teir lærdu um skapanina í 4. flokki.

Skriva „Og Gud sá, at tað var sera gott“ á talvuna. Tosið um heimin í dag. Er alt gott og vakurt?

## Sálmar og sangir til evnið

**Sálmabókin**
Nr. 25 Upp alt, ið Harrin hevur gjørt
Nr. 29 Alt sum frítt og fagurt er

**Songbók Føroya Fólks (1997)**
Nr. 18 Hvørjum man tykjast vakurt hjá sær
Nr. 179 Landið eg bar við mær inn um skúlans gátt

**Aftast í lærarabókini**
Hvør skapti stjørnurnar
Gud hann skapti stjørnurnar
Upp á tindar, gjøgnum dalar
Eg eygu míni hevji upp til fjallanna

**Næmingabókin**
Bls. 191O, tú sum kveikti

**Meira um evnið**
Eins og í bókini til 4. flokk verður byrjað við skapanini, men her verður lagdur størri dentur á vakurleikan í skapanarverkinum. "Alt var sára gott, sá Gud."
1. Mós 1,31. Ætlanin er, at næmingurin skal hóma tað skapta, frá túninum og upp í stjørnuhválvi, og vera settur yvir fyri spurninginum, um alt støðugt er sera gott í dag, eins og Gud helt tað vera í fyrstuni. Um ikki, kann menniskjan so bøta um støðuna, og hevur hon ábyrgd fyri skaparaverkinum?

Í Bíbliuni lesa vit, at menniskjan var krúnan á skaparaverkinum, og at hon tí hevur ábyrgd fyri tí skapta – sí Sálm 8.

Evnið kann lættliga gerast ov tíðarkrevjandi. Lærarin ræður sjálvur fyri hvussu nógv hann ger við teir einstøku kapitlarnar, men havast skal í huga, at tað eru 14 kapitlar í næmingabókini.

# **Heimbygdin** bls. 10

Byrjað verður í túninum, har næmingurin minnist síni fyrstu barnaár. Haðani verður farið til bygdir og býir í Føroyum og seinni út í heim og alheim.

**Hugskot**
- Vís náttúrumyndir av heimstaðnum
- Fá staðarkend fólk inn í skúlastovuna at greiða frá heimstaðnum hjá næmingunum.
- Brúka myndir á internetinum, privatar myndir ella filmsbrot sum lýsa skapanina

**Aktivitetir**
- Næmingarnir siga frá áhugaverdum ella stuttligum hendingum um gerandisdagin í heimbygdini.
- Næmingarnir vísa myndir av heimbygdini, teir sjálvir hava tikið.

- Hví verður sagt, at heima er best?
- Eru øll samd um, at heima er best?

**Samrøðan**
Tosið um, hvør munurin er millum eitt hús og eitt heim. Eru tað karmarnir, húsini sjálv, ella innihaldið, kærleiki og tryggleiki innanveggja, ið gera eitt heim? Hví hava vit brúk fyri at kalla nakað heim okkara? Kunnu vit skifta bústað og kalla hann okkara nýggja heim? Um so er, hví? Flestu dáma at kom heimaftur eftir ein túr t.d. uttanlanda. Hví er tað so? Her kundi eisini verið tosað um tørvspyramiduna hjá Maslow.

**Arbeiðsbókin**
Næmingurin teknar nakrar tekningar frá heimstaðnum, bls. 3.

# **Føroyar** bls. 11

Føroyar verða lýstar í teimum ymsu árstíðunum. Vit eiga hópin av fosturlands-sangum, ið lýsa landið.

**Hugskot**
- Tosið um upplýsingarnar í faktakassanum á síðuni.
- Tosið um áhugaverd støð, tit hava vitjað í Føroyum og um støð, har eingin í flokkinum hevur vitjað.
- Á Snar.fo er ein ikon, ið eitur “Myndasavn”. Her er hópin av myndum úr Føroyum. (Beinleiðis slóð: http://myndasavn.skulin.fo)
- Hyggið eftir heimasíðu, ið vísir vegir og hús kring Føroyar: www.kagi.fo
- Hyggið eftir heimasíðu, ið NÁM hevur gjørt um Føroyar, har til ber at kanna sína vitan: www.fsg.fo/landnam
- Nýtið “Google Earth,” ið kann takast niður av netinum ókeypis. Finnið Føroyar og heimstaðið.

- Hvørji støð kundi tú hugsað tær at vitjað í Føroyum og hví?
- Eru støð, ið tú held-ur vera serliga vøkur?
- Hvat heldur tú vera vakrast við tínum heimstaði?

**Aktivitetir**
- Být næmingarnar í bólkar. Latið teir gera hvør sín film ella myndrøð um Føroya náttúru.

**Samrøðan**
Tosið um vakurleika. Tað er óivað ymiskt, hvat næmingarnir halda vera vakurt í náttúruni ella bygdini. Hetta kann vera áhugavert at práta um.

**Arbeiðsbókin**
Næmingarnir skriva nøkur dømi, hvat eyðkennir Føroyar, bls. 4.

## **Tjóðsangurin** bls. 12

Símun av Skarði, 1872-1842, yrkti tjóðsang okkara, ið kom á prent á fyrsta sinni í 1908. Lagið eigur tónaskaldið Petur Alberg, 1885-1940.

Tað var fámjingurin, Jens Olivur Lisberg , ið evnaði tað føroyska flaggið, Merkið,  í Keypmannahavn í 1919. Hetta var tó ikki viðurkent sum tjóðarmerki fyrrenn 25. apríl 1940 av bretska hersetingarvaldinum. Flaggið hevur stóran týdning sum partur av føroyska samleikanum. Síðan 1947 hevur 25. apríl verið hildin sum føroyskur flaggdagur. Skúlabørnini hava frí hendan dagin, og flaggdagshald vera hildin víða um landið. Tá ið heimastýri var sett á stovn í 1948, varð Merkið endaliga viðurkent av dønum sum tjóðarflagg okkara.

**Hugskot**
- Tosa við næmingarnar um tjóðskap. Hvat er tjóðskaparkensla og hví hava vit ein tjóðsang? Samtalið um týdningin av einum flaggi og eini felags mentan.
- Tosið um innihaldið í tjóðsanginum, syngið hann og lærið tykkum hann uttanat veri tað seg í kristni ella t.d. føroyskum.
- Syngið tjóðsangirnar hjá okkara grannalondum.
- Syngið flaggsangin: “Sjá tú blánar” – sum Hans A. Djurhuus, 1883-1951, smíðaði í 1920 við kenda lagnum hjá Gunnar Mikkelsen.
- Tosið um, hvør munurin er á einum sálmi, sangi og fosturlandssangi.

**Aktivitetir**
- Bið næmingarnar yrkja eitt ørindi í part um føroysku náttúruna ella být upp í bólkar. Til ber at bera uppá rím ella ikki.

Hvat eru fosturlands-
sangir um?

**Samrøðan**
Tað liggur í orðinum, at fosturlandssangir snúgva seg um fosturlandið, føroysku náttúruna og fólkið, ið her býr. Vit eiga fleiri hundrað fosturlandssangir, bæði eldri og nýggjari. Ein stórur partur finst í Songbók Føroya fólks.

**Arbeiðsbókin**
Næmingarnir finna røttu endingarnar til nakrar reglur av tjóðsanginum, bls. 5.

## **Føroyar í myndum** bls. 13

Myndir kunnu siga meira enn mong orð, verður sagt. Hesum kunnu vit vera samd um. Ein fotomynd av nøkrum tú eigur kært, kann ikki skiftast um við mong orð, ið greiða frá tí sama.

**Hugskot**
- Finnið myndir á netinum um djór og náttúru í Føroyum. Fleiri og fleiri heimasíðir koma við slíkum myndum.
- Á Snar.fo er ein ikon, ið nevnist Fuglar. Her eru bæði upplýsingar, filmsbrot og ljóðbrot at heinta.

**Aktivitetir**

- Gerið eina kapping í flokkinum, hvør kann taka tað vakrastu náttúrumyndina. Lærarin, ella næmingar og lærarar uttan fyri flokkin, eru dómarar.

- Hvat siga myndirnar tær?
- Hvat er vakurleiki?

**Samrøðan**

Samrøðan tekur støði í myndunum á síðuni. Her er nógv at tosa um. Nógvar myndir snúgva seg um føroyska mentan. Her kann vera eitt hugskot at tosa um, hvat mentan er. Fuglar og djór eru eisini við. Vit hava ofta eina felags áskoðan á, hvat vakurleiki er, men tað er langt frá altíð, at so er. Hvat er eitt vakurt fólk, ein vakur bil, vøkur klæði? Hvør avger, at nakað er vakurt? Nær er nakað vakurt? Nær er nakað ljótt ella mishátt?

## **Niðan á tindin** bls. 14

Ætlanin við søguni er at fáa næmingarnar at hugsa um ta heimligu náttúruna. Søgan vísir á ta stórbaru náttúru vit eiga og sum vit gera rætt at vitja. Náttúran eigur nakað, sum tøknin ikki eigur og øvugt. Tó kunnu hesi fínt sameinast, tá ið tú tekur myndir frá einum túri og aftaná situr spentur og hyggur at teimum.

**Hugskot**

- Spyr næmingarnar, hvussu nógvar fjallatindar teir hava vitjað, og um teir hava tikið myndir frá hesum túrum, ið teir kunnu vísa flokkinum.
- Hyggið í eitt Føroyakort og kannið eftir, hvussu til ber at ganga upp á ávísar tindar og fjøll í Føroyum.
- Gangið ein túr niðan á ein tind nær ella fjart við heimstaðið. Takið myndir og tosið um túrin aftaná.

- Hvussu hevði verið bara at sæð heimin á einum teldu-skíggja?
- Dámar tær eins væl og Elsa og Livar at ganga í fjøllunum?

**Samrøðan**

Her verður komið inn á tøknina. Ber til at uppliva náttúruna gjøgnum ein telduskíggja? Svarið er nei, hóast til ber at síggja vakrar myndir og filmar av náttúruni her. Lat næmingarnar greiða frá, hvat teimum dámar at ganga í náttúruni, - Hava teir onkra uppliving, ið teir kunnu siga hinum næmingunum? Spyr um neyðugt hv-spurningar: hvar, hvat, hvørjum, hvussu og nær, so ein gjøllari frágreiðing fæst.

**Arbeiðsbókin**

Næmingarnir tekna tað, ið teir ímynda sær, at Livar og Elsa sóu uppi á tindinum, bls. 6.

## **Morgunsólin rísur og We are the World** bls. 15

Michael Jackson og Lionel Richie gjørdu sangin "We are the world" í 1985 í sambandi við eitt stórt átak við fleiri kendum amerikanskum sangstjørnum at stuðla neyðhjálp til Afrika. Boðskapurin í báðum sangunum er næstrakærleiki.

- Tosið um sangirnar og um ymisk fólkasløg.

**Samrøðan**

Tosið um húðarlit og um ymiskleikan og líkleikan hjá menniskjum. At vit eru brøður og systrar, at vit skulu virða øll óansæð húðarlit, átrúnað, tjóðskap o.s.fr. At jørðin er ætlað okkum øllum, og at eingin hevur betri rætt til hana enn ein annar.

## **Okkara jørð** bls. 16

Vit eru farin frá túninum, har barnið vaks upp, til útheimin. Næmingurin fær eina fatan av, at Føroyar eru ein pinkulítil partur av okkara fjølbroyttu jørð.

**Hugskot**

- Hav ein globus hjá tær ella eitt verðinskort frammi, meðan tú tosar.
- Samtalið um altjóðager.
- Greið næmingunum frá hvaðan vit fáa flestu av okkara mongu innfluttu vørum.
- Syngið sangir úr ymsum londum. Næmingarnir eru so smátt farnir at syngja á enskum. Annars eru nógvir sangir úr ymsum londum týddir til føroyskt. Sí t.d. sangbøkurnar: "100 sangir" og "Heiðaljóð 125 sangir," ið Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út. Andreas Andreasen skipaði og legði til rættis.

## **Heimurin í myndum** bls. 17

Myndir av kendum bygningum og standmyndum eru á síðuni.

Heimsins 7 undurverk:

- Zeus standmyndin í Olympia.
- Artemistemplið í Efesus
- Halikarnassos Gravtemplið
- Kolossurin á Rhodos
- Vitaverkið við Alexandria
- Keopspyramidan í Egyptalandi
- Uppbygdu vakstrargarðarnir í Bábylon

Av hesum er bara Keopspýramidan til á okkara døgum. Á internetinum ber til at finna úttav nær hesir bygningar vóru bygdir og nær teir fóru til grundar.

Av øðrum stórum og kendum bygningum ella standmyndum kunnu nevnast: Kinesiski múrurin, fornaldarbýurin Petra í Jordan, Kristusmyndin í Buanes Eires í Brasilia, Machu Picchu toftirnar í Peru, Chichen Itza – Maya toftir í Mexico, Colosseum í Róm, Taj Mahal gravtemplið í India og Ankor Wat í Kambodja.

**Hugskot**

- Tosið um heimsins sjey undurverk og um kendar bygningar í okkara tíð. Finn myndir á Google ella filmar á Youtube.
- Nýt Google Earth at leita eftir heimspørtum v.m.

- Hvat siga hesar myndirnar tær?
- Hvørji lond ella støð kundi tú hugsað tær at vitja? Hví?

**Samrøðan**

Tosið um myndirnar á bls. 17 í næmingabókini. Hvørji støð kundu næmingarnir hugsað sær at vitja? Hví? Hvar hava teir verið og hvat hava teir sæð í øðrum londum?

**Arbeiðsbókin**

Næmingarnir skulu seta striku millum navn og rætta mynd av kendum nútíðar bygningsverki, bls. 7.

## **Alheimurin** bls. 18 og 19

Á síðu 18 er brot úr sanginum: "Eg vil telja stjørnurnar". Allur sangurin er aftast í hesi lærarabók.

**Hugskot**

- Syngið sangin: “Ja, um eg slapp á mánan,” sí aftast í hesi lærarabók.
- Samtalið um sólina, gongustjørnurnar, Vetrarbreytina (ella Mjólkarvegin) og tær milliardir av stjørnubreytum, ið liggja uttan fyri okkara stjørnubreyt.
- Hyggið eftir stjørnum við forritinum Google Earth. Vel “View”, “Explore” og “Sky”.
- Tosið um hvussu lítil heimurin er samanborið við alheimin.
- Lesið "Visti tú?" kassan á s. 19, og tosið um fjølbroytta lívið í heiminum.

**Aktivitetir**

Bið næmingarnar hyggja út í rúmdina eitt stjørnuklárt kvøld og seinni greiða frá, hvør kensla stakst upp í teimum, meðan teir hugdu. Lærarin kann eisini læra teir at finna Norðstjørnuna og skyna á ymiskum stjørnumerkjum, t.d. Karlsvogninum, Kassiopeia ella Tvíburðunum. Einføld stjørnumynd er á: http://kitts.homepage.dk/stjernebilleder.htm

## **Míni kelidýr** bls. 20

**Hugskot**

- Tosið um søgurnar.
- Tosið um hvussu tað kenst tá eitt kelidýr doyr.
- Hava næmingarnir líknandi søgur at siga frá?

**Aktivitetir**

- Næmingarnir skriva søgur um teirra kelidýr.
- Næmingarnir vísa myndir av teirra kelidýrum.

## **Kettlingarnir úr Havnardali** bls. 21

Í Sálmi 8 lesa vit, at Gud setti menniskjuni at ráða yvir skapanarverkinum. Tað eru fleiri náttúruverndarfelagsskapir um heimin, ið vilja verja um náttúruna, sama við djóraverndarfelagsskapum, eisini í Føroyum. Djóraverndarfelagið í Føroyum vil, sum orðið sigur, verja djórini. Vit hava skyldu at boða frá, um vit síggja djór vera misrøkt og pínd.

**Hugskot**

- Kenna næmingarnir dømi um djórapínslu? Er grindadráp og slátur av seyði djórapínsla? Hvar gongur markið?
- Hyggið eftir reglum, ið umtala, hvussu farast skal at undir slátri av seyði, neytum og grindahvali.
- Setið tykkum í samband við Djóraverndarfelagið og biði tey koma á gátt at greiða tykkum frá arbeiði teirra. Fyrireika næmingarnar við spurningum, teir kunnu seta.

- Hvussu nógv í flokkinum eiga eitt kelidýr?
- Hvat kelidýr hevði tú ynskt tær og hví?
- Hvussu skulu vit bera okkum at við kelidýrum?

- Nevnið onkur dømi um kelidýr
- Hví hava vit júst tað slagið av dýri, og hvat er serligt við tí?

**Samrøða 1**
Her er gott høvi at tosa um, hvør í flokkinum eigur kelidýr. Hvat krevst at eiga eitt kelidýr? Hví skulu vit vera góð við dýrini?

**Samrøða 2**
Hyggi at myndunum á síðuni. Hvat er eitt gott kelidýr? Hvussu við slangum, eiturkoppum ella fýrbeinum.

**Arbeiðsbókin**
Næmingarnir finna 3 fotomyndir av kelidýrum hjá teimum sjálvum ella øðrum og líma tær á síðuna, bls. 9. Uppgávan bls. 8 er at finna ymisk sløg av livandi dýrum og at flokka tey.

## **Náttúruríkidømi** bls. 22

Í Edens urtagarði vóru alskyns trø, ið bóru frukt. Náttúran hevur nóg mikið til, at vita øll kunnu gerast mett, um væl verður farið um.

Nortið verður við ríkidømi í jørð og undirgrund.

**Hugskot**
- Prátið saman um, hvaðan tilfarið kemur til m.a. hús, bilar, teldur og bløð.

**Aktivitetir**
- Flokkurin savnar steinar og finnir heitið.
- Syngið sálmin: Upp alt, ið Harrin hevur gjørt. (sí sálmayvirlitið til kap.) Eitt ørindi er: Og gingu kongar fram á rað/og vístu megi mesta,/ teir megnaðu ei minsta blað/ á notulegg at festa. Tað ber til at festa bløð á plantuvøkstur, men ber til at skapa lív?

**Samrøðan**
Allur matur, vit eta, er frá náttúruni so ella so. Sama við tí materiella.

- Tosið um, hvørjum lutir eru gjørdir úr?

## **At fara væl um í náttúruni** bls. 23

Her verður komið nærri inn á, at tað er ikki líka mikið, hvussu vit fara um náttúruna. Tað er skjótt at órudda. Tíbetur hava vit skipanir, sum bøta um hetta. Øll hava skyldu at halda náttúruna reina, so tað verður liviligt fyri øll at ferðast í henni.

**Hugskot**
- Samtalið um, hvat dálking er. Hví dálka vit, og hví skulu vit ikki dálka? Næmingarnir skulu vita, at hvør einstakur kann vera við at halda náttúruna reina. Vit hava ábyrgd av náttúruni.
- Ber til at dálka seg sjálvan? Tosið um sigarettir, vandamikil evnir og slíkt, ið tú kanst anda í teg. Hvussu er luftin í nógvum stórum milliónbýum?

**Aktivitetir**
- Gerið ein felags ruddingardag saman við flokkinum ella skúlanum.

## **Eingin vøkur sjón** bls. 24

Nógv burturkast liggur fram við strendur okkara, ið m.a. skip hava kastað fyri borð. Rustað bilvrak og aðrir brúktir lutir liggja og sløðast ymsastaðni, har tey ikki áttu at verið.

**Hugskot**

- Dálking skaðar bæði vatn, sjógv og luft. Tosið um hesi viðurskifti.
- Farið ein túr oman í fjøruna og leggið merki til, um nógv burturkast er skolað uppá land. Hvat slag er av burturkasti?

Hvat siga hesar myndir tær?

**Samrøðan**
Næmingarnir tosa um tað, teir síggja á myndunum. Hava næmingarnir sæð burturkast í heimbygdini ella aðrastaðni?

## **Dálking hevur avleiðingar** bls. 25

Tekningin er íblást av listaverki hjá Ole Wich, ið sýndi hvat fer at henda, um allur ísurin á Grønlandi bráðnar. Vatnstøðan veksur 7 metrar við vanlukkuligum avleiðingum fyri mong øki í heiminum. Her sæst, hvussu hetta hevði rakt Tinganes.

Samrøðan hjá Elsu og Livar í skúlanum umrøður spurningin, hvørja avleiðing tað fær, tá ið vit fara illa um náttúruna og hitt livandi. Evnið skal leggjast fram soleiðis, at næmingurin skilir, at hann er partur av hesum, og at hvør einstakur hevur ábyrgd av náttúruni.

**Hugskot**

- Hvat høvdu næmingarnir sagt ella spurt læraran í søguni á s. 25?
- Hvussu man heimurin fara at vera um 50, 100 ella 1000 ár?

**Aktivitetir**

- Gerið leik um Elsu og Livar í skúlanum.

## **Hundurin og skuggi hansara** bls. 26

Mangan verður sagt, at tey, ið eiga nógv vilja hava meira. Meira vil hava meira. Mótsetningurin til hetta er at vera nøgdur.

**Bíblian sigur:**
“... peningagirndin er rót til alt tað, sum ilt er,” 1. Tim 6,10.
“...gudsóttin saman við nøgdsemi er mikil vinningur.” 1. Tim 6,6.
“Takkið í øllum førum.” 1. Tess 5,18.

Esops dømi eru elligomul – tey eru søgd fyri uml. 550 f. Kr. Tey flestu eru um dýr, og hvussu tey bera seg at. Jákup Dahl týddi Esops dømi til føroyskt – bókin er 92 síðir. Nám gav út í 1988.

**Hugskot**

- Tosið um myndamál. Komið við dømum.
- Lesið fleiri søgur úr Esops dømi og tosið um tær.

- Tosið um Esops dømi.
- Hvørjar avleiðingar fær ovurnýtsla av heimsins tilfeingi?
- Hvussu fara vit væl

**Samrøðan**
Summi hungra, meðan onnur doyggja av ovurfiti. Stórur munur er á ríkum og fátækum londum hvat viðvíkur livialdri, útbúgving o.s.fr. At fara væl um náttúruna er t.d. at nýta rávøru umaftur og at brúka grøna orku. Her kann samskiftið fara inn á koltvíiltuútlát, osonlag, veðurlagsbroytingar, vatnstøðan v.m.

## **Umhvørvisvernd** bls. 27

Á bls. 21 var evnið djóravernd – her er tað umhvørvisvernd. Eins og vit hava ábyrgd fyri tí livandi, so hava vit tað eisini fyri náttúruni.

**Hugskot**
- Fáið fólk úr umhvørvisverndarfelagskapi á gátt at tosa um teirra arbeiði.

**Aktivitetir**
- Hvør næmingur plantar einhvønn vøkstur í skúlastovuni í ein urtapott. Uppgávan er at fara væl um og fáa at spíra og grógva.

- Hví er alt ikki "sera gott" í heiminum í dag?
- Hvat sigur Bíblian um dýra- og náttúruvernd?
- Hvørjir fyrimunir og vansar eru við tí hátti, vit fara við

**Samrøðan**
Gud segði, eftir at hann hevði skapað, at alt var "sera gott." Hetta var áðrenn syndafallið. Spurningurin er, um alt er sera gott í dag? Tað er skjótt at koma til ta niðurstøðu, at tað er tað ikki. Nógv kundi verið betri. Men heldur enn at stara at trupuleikanum, ber til at hyggja frameftir og læra av feilum.

**Arbeiðsbók**
Næmingarnir skriva søgur, uppgáva 8. Somuleiðis skriva teir hvussu dýrini í uppgávu 9 skulu hjálpast. Í uppgávu 10 skriva teir ein lista av hugskotum um hvussu bøtast kann um livikor og umhvørvið.

# 1. Fólkakirkjan




**Tittulblað**
Hoyvíkar kirkja var vígd 4. november 2007. Hans Jacob Joensen, bispur, vígdi kirkjuna. Margretha drotning legði grundarsteinin 20. juni í 2005. Innskriftin er úr 5. Mós 33,27: Bústaður er hin ævigi Guð, og her niðri eru hinir ævigu armar.

Kirkjuklokkan er gjørd í Tønsberg, Vestfold í Noregi. Á kirkjuklokkuni stendur eitt ørindi, sum Gunnar Hoydal hevur yrkt:

UM BYGD
HAGA, VÍK OG DAL
Í LJÓSINS VERKI EG
LJÓÐA SKAL

**Sálmar og sangir til evnið:**

**Sálmabókin**
Nr. 53 Ongum er so trygt at fara
Nr. 138 Mildi Jesus, tú sum segði
Nr. 242 Kirkjan hon er eitt gamalt hús
Nr. 243 Fedranna kirkja í Føroya tjóð
Nr. 248 Guds kirkjulið er heimsins størsta undur
Nr. 366 Men tað skalt tú, ungdómur, sanna
Nr. 370 Gakk tú tryggur fram við góðum treysti
Nr. 455 Vinir Guds á ongum sinni

**Aftast í lærarabókini**
Byggja Guds ríki
Tað lítla ljós eg fekk

**Meira um evnið**
Ávegismálini í kirkjusøgu í námsætlanini eftir 6. flokk eru m.a.:

1. at greiða frá kirkjusøguni á staðnum
2. at greiða frá øðrum kristnum samkomum á staðnum

Í hesum kapitlinum verður miðað eftir, at næmingarnir viðgera hesi evni við myndum og samrøðum í flokkinum. Fyrst verður komið inn á heitini á gudshúsum hjá ymsum kirkjuliðum og samkomum í Føroyum og síðani um nøvn teirra. Eisini verða kirkjuligu tænasturnar viðgjørdar: dópur, konfirmatión, brúðarvígsla og jarðarferð. Orðið "ritur" kann vera nýtt í einum breiðum samanhangi, ið er kent frá øllum átrúnaði.

At enda í hesum kapitli verður grundlógin og kirkjuskipanin tikin fram.

## **Fólkakirkjan** bls. 30

Komið verður inn á ymisk heiti á gudshúsum. Summi gudshús eru uppkallað eftir

heimstaðnum: Hests kirkja ella missiónshúsið í Kollafirði, meðan onnur hava heiti eftir støðum í Bíbliuni.

**Hugskot**

- Tosið um, hvar nøvnini á gudshúsum mangan stava frá. Finni Bíbilsku nøvnini í Bíbliuni. Hvat serligt var júst við hesum navni/staði í Ísrael?
- Tosið um, hvat kirkjan vil við sínum boðskapi? Býr Gud í kirkjuni? Passar hann inn har? Hvønn brúkar Gud at arbeiða í síni kirkju? Hví eitur tað fólkakirkja?
- Tosið um einsemi og felagsskap.

**Arbeiðsbókin**

Næmingarnir skulu hjálpa trimum børnum veg í kirkju, bls. 12. Teir skulu somuleiðis finna røtt nøvn til tær kirkjur og tey gudshús, ið hoyra til bls. 13 í Arbeiðsbókini.

## **Fólkakirkjan** bls. 31

Tosað verður um kirkjuna á heimstaðnum. Hesa kenna næmingarnir og hava óivað vitjað hana. Ofta er hon sjónlig í landslagnum.

**Hugskot**

- Hav eina mynd við í tíman av kirkjuni/gudshúsunum hjá tykkum.
- Hygg inn á www.folkakirkjan.fo. Har stendur, nær tær eru bygdar, hvør hevur teknað tær. Somuleiðis finnir tú nøvn á prestum í ymsu prestagjøldunum, reglur v.m. Somuleiðis finnast heimasíðir hjá øðrum gudshúsum í Føroyum.

**Aktivitetir**

- Vitjið kirkjuna á staðnum. Fáið prest ella onkran kirkjukunnugan at greiða frá søguni um kirkjuna og vísa og greiða frá ymsu lutunum í kirkjuni v.m.
- Gerið eina næmingagudstænastu, um dagin ella kvøldið, har næmingarnir fáa ymsar uppgávur t.d. at vera deknur, klokkari, sangarar, at spæla undir og lesa ymsar stuttar tekstir upp úr bíbliuni.
- Gev næmingunum eitt spurnarark við í kirkjuna, ið teir fylla út, meðan teir eru har. Dømi: Hvussu nógv vindeygu eru, hvat skriftorð stendur uppi yvir altarinum, hvørji orð standa á kirkjuklokkuni, hvussu nógvar "stemmur" hevur kirkjuurgan v.m.
- Havið eina sangløtu, har tit syngja teir sálmar, ið næmingarnar kenna best úr sálmabókini. Bið møguliga urguleikaran í kirkjuni spæla undir ella onkran næming/lærara, ið dugir. Um hetta ikki letur seg gera um dagin, so kann hetta eisini vera um kvøldið. Spyr prest um loyvi.
- Sum tvørgreinaarbeiði kann kristni- og evninglærarin skipa fyri, at næmingarnir gera eitt modell av kirkjuni á heimstaðnum. Næmingarnir gera ymisk arbeiði í bólki: ein bólkur evnar kirkjubygningin við t.d. stívum pappi og mála hann, ein annar evnar fólk og bilar, ið standa uttanvert kirkjuna á parkeringsbásum. Grundplátan verður málað grøn, og síðan verður alt til seinast sett uppá pláss. Um arbeiðið skal vera meira umfatandi, so kann høsnarhegn nýtast sum undirlag omaná plátuna, har ávíspappír verður límað við tapetlími á og síðan málað við hóskandi litum. Tilfar: 1x1,5 metur (ella sum tað passar) t.d. spønpláta, høsnarhegn, stívt papp, máling, penslar, saksar, skúlalím, blýantar, tapetlím.
  Takið mynd av hesum og leggið tær út á heimasíðuna hjá flokkinum, um hon finst. (sama við øðrum tilfarið, ið verður gjørt í kristni.)

- Hví hava vit kirkjur og onnur gudshús?
- Hví eru bygningarnir so ólíkir?
- Hvørji nøvn á kirkjum og gudshúsum kennir tú?
- Hvat veitst tú um kirkjuna, har tú býrt?
- Er nakað serligt við kirkjuni hjá tykkum?

**Samrøðan**
Kirkjan hevur sínar røtur aftur frá gamla tjaldtemplinum hjá ísraelsfólki. Síðan kristnin fór um Europa/heimin, so hava kirkjur og gudshús verið bygd, har fólk koma saman um Guðs orð. Sniðini á bygningunum er ymisk alt eftir fólkastødd, umhvørvi, har teir standa, fíggjarligu karmunum, arkitekti, hvussu fjølbroytt arbeiðið er á staðnum og harvið hvørji krøv eru til kirkjuna/gudshúsið v.m. Tosið eisini um líkleikarnar. Næmingarnir greiða frá nøvnum á kirkjum og samkomuhúsum, teir kenna. Tosið um gudshúsini á heimstaðnum, nær tey vóru bygd, hvussu nógv sitipláss eru, hvør er prestur ella samkomuleiðari v.m. Tosið um stødd, snið, innrætting og eitthvørt, ið er serstakt.

**Arbeiðsbókin**
Næmingarnir tekna kirkjuna á heimstaðnum uttan og innan á heim, 2 rútar til hetta, bls. 14.

## **Tænastur í kirkjuni** bls. 32-35
Her verða tær kirkjuligu tænastunar umrøddar: dóp, ferming, brúðarvígsla og jarðarferð umframt aðrar serligar tænastur. Havast skal í huga, at ikki øll hugsa líka um dóp og ferming.

**Hugskot**
- Spyr næmingarnar, um dóp og tosið um ymisk dópssjónarmið. Gleða teir seg at skula fermast? Um so er, hví? Hvat sigur brúðarvígsla og jarðarferð teimum? Havast skal í huga, at ikki øll vera fermd og doypt. Samtalan má tí vera rúm.
- Tosið við næmingarnar um, hvat kirkjan ikki kann nýtast til. Hví kann hon ikki tað? Samtalið um, hví vit víga kirkjur.
- Lesið og tosið um frásøgnina, tá ið Jesus rak fólkini út úr templinum, ið keyptu og seldu. Sí Matt 21,12-14

- Tosið um tær ymisku tænasturnar í kirkjuni.

**Samrøðan - bls. 35**
Tosið um, hvørjar dagar, vit serliga minnast. Hví minnast vit hesar?
Tosið um hvørjar upplivingar næmingarnir hava í samband við luttøku í kirkjuligum tænastum.

**Arbeiðsbókin**
Næmingarnir svara spurningum um kirkjuligu tænasturnar, bls. 15. Teir tekna ringar á mannfólka- og konufólkahond, bls. 16.

## **Grundlógin - trúarfrælsi** bls. 36-37
Víst verður í prosentum luttøkuna í fólkakirkju, kristnum trúarbólkum og øðrum trúarsamfeløgum.

**Hugskot**
- Setið tøl í stabbamynd ella líkn. talvu.
- Hyggið eftir heimasíðum hjá ymsum trúarbólkum.

- Er neyðugt at hava grundlóg?
- Hvønn týdning hevur trúarfrælsi?

**Samrøðan**
Tosað verður um grundlógina, ið er lógin yvir og undir øllum. Greið næmingunum frá, at hon er grundarlagið undir øðrum lógum og reglum í okkara samfelagi.

# 3. Gud sonur




**Tittulblað**
Heimsins neyð og ræðuleikar síggjast. Jesus er settur mitt á myndina, hangandi á krossinum. Tosið um súmbolvirði í málninginum hjá Marc Chagall (1887-1985), russisk-franskur listamaður.

**Sálmar til evnið:**

**Sálmabókin**
Nr. 63 Jesus besta navnið er
Nr. 76 Jesus, hitt einasta
Nr. 78 Jesusnavnið aldri bliknar
Nr. 79 Eitt navn á fold
Nr. 81 O, Jesus, bróðir besti
Nr. 106 Her koma Jesus tíni smá
Nr. 123 Dýrasti Jesus
Nr. 154 Eg veit ein góðan seyðamann
Nr. 179 So stillan Jesus gongur
Nr. 201 Grøvin sterka rivnað er
Nr. 289 Eg veit eitt land, har vakurt er
Nr. 358 Gud faðir, hann veri nú verndari tín

**Aftast í lærarabókini**
Faðir, tú meg skapti
Í staðnum Betlehem
Bókin um Jesus er bók fyri meg
Kennir tú hann, sum á vatninum gongur
Jesus elskar meg, o ja

**Meira um evnið**
Í Kristni 4 er 1. grein av trimum greinum í ápostolsku trúarjáttanini umrødd, Gud faðir. Í Kristni 5 er 2. grein tikin fram, Gud sonur, og í Kristni 6 verður tosað um Gud heilaga anda. Í øllum greinum er Gud nevndur sum Faðirin, Sonurin og Heilagi Andin. Gud er ein og samstundis tríggir, - tey kristnu trúgva á ein tríeindan Gud.

Orðið tríeind kemur ikki fyri í Bíbliuni. Theofilus úr Aleksandria var fyrstur at peika á hetta, men tað var kirkjufaðirin Tertullian (f. ár 160), ið fyrstur rættuliga kom fram við hesum. Í frumkirkjuni var stórt gudfrøðiligt stríð viðvíkjandi tríeindini, og serliga um annan persónin. Spurningurin var, hvussu tú skuldi skilja viðurskiftini millum Faðirin og Sonin og m.a. um Jesus hevði verið til frá byrjan.

Jødar hava bara Gud faðir við í teirra gudsmynd. Teir undirstrika hetta m.a. við 5. Mós 6,4. "Hoyr Ísrael, Harrin, Gud vár, Harrin er einastur." Profetarnir nevna eisini ofta, at Gud er ein, og at umframt hann er eingin Gud til. Jes 44,6. Vit finna hetta eisini í N.T. t.d. Jóh 17,3 og í 1. Kor 8,4. Tó verður fleiri staðni peika á tríeindina m.a.

í missiónsboðunum um at doypa í navni Faðirsins, Sonarins og Heilaga Andans. Matt 28,18-20. Sí eisini Jesu dóp, Matt 3, 16-17 og ápostólsku heilsaninar, 2. Kor 13,13.

Tá vit siga Guds sonur, so er skjótt at halda, at hann er undir Gud faðir. Tað, sum faðirin hevur og er, tað hevur og er Sonurin. Hebr 1,1-4 Hetta sæst serliga aftur, tá ið Jesus verður doyptur. Sí Jóh 3,16 – lítla Bíblian.

Bíblian nevnir fleiri staðni, at Jesus var við, tá ið heimurin var skapaður: Kol 1,16, Jóh 17,5, Jóh 1,1-18 og 1.Jóh 1,1-3.
Jóhannesar evangeliið er eitt gott stað at fara til, tá Kristi guddómleiki verður umrøddur. Jesus tosar her um, hvussu hann og faðirin eru eitt t.d.: Jóh 5,19-23, Jóh 10,30 og Jóh 17,5.

Hjá Jóh 1,14 stendur, at Jesus hevur dýrd, sum einborni sonur hevur frá faðir sínum, fulla av náði og sannleika.

## **Ápostólska trúarjáttanin** bls. 40

Fólkakirkjan nýtir mest hesa trúarjáttan, hóast tað eru fleiri aðrar trúarjáttanir, m.a. hin nikæno-konstantinopolitanska trúarjáttanin og hin athanasianska trúarjáttanin. Umframt hetta eru onnur luthersk játtanarrit: hin augsburska trúarjáttanin og Luthers lítla Katekismus.

Luther skrivaði um 2. grein:
-Eg trúgvi, at Jesus Kristus, ið er sannur Gud, føddur av faðirnum í upphavi, og eisini sannur maður, føddur av Mariu moy, er harri mín, sum hevur endurloyst meg farnu og dømdu menniskju, bjargað og vunnið meg frá øllum syndum, frá deyðanum og frá djevulsins valdi, ikki við gulli ella silvuri, men við sínum heilaga, dýrabara blóði og við síni sakleysu pínslu og deyða, fyri at eg með alla skal vera hansara og í ríki hansara liva undir honum og tæna honum í ævigum rættlæti, sakloysi og sælu, líkasum hann er staðin upp frá deyðum, livir og ræður um allar ævir. Sanniliga er tað satt.

*Úr Luthers katekismus.*

**Arbeiðsbókin**
Næmingarnir skulu seta myndir frá Jesu lívi í rætt talrað, bls. 18. Teir skulu eisini tekna eftir einari tekning av Jesusi, bls. 19. Somuleiðis skulu teir sjálvir tekna 4 tekningar, ið einfalt lýsa brot úr Jesu lívi frá byrjan til enda, bls. 20.

## **Jesus - Gud sonur** bls. 41

Her verður sagt, at Gud, av kærleika til heimin, sendi son sín. Bíblian sigur, at syndin hevði oyðilagt sambandið millum Gud og menniskjuni. Men tá ið fólkið angraði sína synd, so fyrigav Gud teimum.

í 1. Mósebók lesa vit, at ísraelsfólk liðu stóra neyð í oyðimørkini, tí ein hervilig sjúka var farin at ganga. Fólk í hundraðtali doyðu, men Gud bað Móses gera ein koparorm. Tey, ið hugdu uppá hann, gjørdust frísk. Koparormurin er ein mynd av Jesusi: "Og eins og Móses hevjaði upp ormin í oyðimørkini, soleiðis eigur menniskjusonurin at verða upphevjaður til tess, at ein og hvør, sum trýr, skal hava ævigt lív í honum." Jóh 3,14-15.

Profetorð um Messias:

- Men av Isai runni skal kvistur spretta fram, og angi av rótum hans bera frukt. Og Andi Harrans skal hvíla yvir honum, andi vísdóms og vits, andi ráðs og kraftar, andi kunnskapar og ótta Harrans. Jes 11,1-2
- Tí at barn er okkum føtt, sonur okkum givin, og á herðum hans skal høvdingadømið hvíla; navn hans skal verða kallað undur, ráðgevi, veldigur Gud, ævinnar Faðir, friðarhøvdingi. Jes 9.6
- Men tú, Betlehem Efrata, eina minst av Júda túsundum, frá tær skal tó koma hann, sum høvdingi skal vera yvir Ísrael; frá forðum er upphav hans, frá ævinleikans døgum. Mika 5,1
- Rópa av gleði, Zions dóttir, og fegnast tú, Jorsala dóttir: Sí kongur tín til tín kemur; rættvísur er hann og sigursælur, lítillátur á asna hann ríður, á ungum øsnufola. Hann birtir frið millum tjóða við sínum orði; frá havi til havs skal vald hansara røkka, frá Ánni alt at endamarkum jarðar. Zak 9,9-10
- Men hann var særdur vára synda vegna og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og av sárum hans fingu vit heilsubót. Jes 53,5
- Gud segði við ormin: -Og eg seti fjandskap millum teg og konuna, millum avkom títt og avkom hennara; tað skal morla høvur títt, og tú skalt bíta tað í hælin! 1 Mós, 3,15

**Hugskot**
- Lat næmingarnar sláa upp í Bíbliuni á tey skriftorð, ið eru nevnd omanfyri og somuleiðis, tey, ið eru nevnd á bls. 41 í lærubókini.
- Í samband við evnið um jólini í lærubókini til 4. flokk, var farið ígjøgnum teir týdningarmiklastu partarnar um Jesu føðing. Eisini ber til at lesa Luk 1,26-38, Luk 2,1-20, Matt 1,18-25, ið umrøða hetta.
- Tosið um týdningin av, at Maria gjørdist við barn av Heilagum Anda.

## **Jesus - eitt menniskja** bls. 42

Jesus var eitt vanligt menniskja og samstundis Gud. Sum menniskja kendi hann til alt tað, tað kennir og tørvar. Jesu deyði verður nærri lýstur undir páskavikuni, bls. 167.

**Hugskot**
- Tosið um ymsu nøvnini, ið Bíblian hevur um Jesus. Lesið skriftorðini, lat næmingarnar sláa upp í Bíbliuni. Skriftorðini eru sett upp, so tey fylgja raðfylgjuni í Bíbliuni.
- Livar undrast um aldurin á Jesusi, tá ið hann doyði. Hvat er ungt og hvat er gamalt hjá næmingum í 5. flokki? Tosið um aldur.

**Arbeiðsbókin**
Næmingurin svarar spurningum við at nýta Bíbliuna, bls. 21

## **Hvønn hildu fólk Jesus vera** bls. 44

Fólk á Jesu døgum vóru ikki á einum máli um hvør Jesus í roynd og veru var. Í dag er støðan kanska tann sama.

Um Jesu uppreisn: t.d. Jóh 20. Jesu himmalsferð: Áp 1,1-11.

- Hvør var Jesus?
- Hvør var uppgávan hjá Jesusi á jørðini?

**Samrøðan**
Næmingarnir vita nógv at siga frá um Jesus, hansara orð, lív og virki. Lat allar næmingarnar sleppa framat við sínum.

Hugskot
- Tosið um hvat Lutherska læran sigur um Jesus? Eru søgulig prógv fyri øllum sum stendur í Bíbliuni? Hvat er trúgv og hvat er sannroynd?

**Arbeiðsbókin**
Næmingarnir ímynda sær eina samrøðu, har fólk vita týðindi um Jesus. Staðið er við ein brunn. Næmingarnir gera eina einfalda teknirøð í 4 myndum við teksti, bls. 22.

## **Jesus - Gud** bls. 45

Um Jesu uppreisn: t.d. Jóh 20. Jesu himmalsferð: Áp 1,1-11.

Móðir Jesu, fekk eina serliga uppgávu, at vera móðir til Jesus. Í katólsku kirkjuni er hon halgimenni.

**Arbeiðsbókin**
Næmingarnir eftirlíkna og tekna súmbolir, ið umboða Jesus, bls. 23.

# Sangir

## 1. Hvør skapti stjørnurnar

*F*
1. Hvør skapti stjørnurnar,
*$C^7$ F*
stjørnurnar, stjørnurnar,
*Dm*
hvør skapti stjørnurnar?
*Gm $C^7$ F*
Gud í himlinum!

2. Hvør skapti blómurnar,
blómurnar, blómurnar,
hvør skapti blómurnar?
Gud í himlinum

3. Hvør skapti fuglarnar,
fuglarnar, fuglarnar,
hvør skapti fuglarnar?
Gud í himlinum!

4. Hvør skapti teg og meg,
teg og meg, teg og meg,
hvør skapti teg og meg?
Gud í himlinum!

5. Hvør skapti stjørnurnar,
blómurnar, fuglarnar,
hvør skapti teg og meg?
Gud í himlinum?

6. Hvørjum skal eg siga takk,
siga takk, siga takk,
hvørjum skal eg siga takk!
Gud í himlinum!

*Mildred Adair*
*Mai Breckmann*

*Sangurin er á fløguni „So Gott at vita", 2004, og „Eg eri ein K", 2001.*

## 2. Gud hann skapti stjørnurnar

*A D*
Gud hann skapti stjørnurnar,

*A*
og hann skapti land og hav,

*E* *$E^7$*
og hann skapti fjøll og dal,

*Bm/E B/E A*
og hann skapti meg.

*A D*
Men tað er nakað, sum nógv størri er,

*A*
at Jesus gav sítt lív

*A E*
fyri meg og allan heimin

*E A*
á Golgata.

*Ókendur*

## 3. Gud hvønn ein smáfugl hevur skapt

*F F/A $B^b$ $B^b$/G*
Gud hvønn ein smáfugl hevur skapt,

*C $B^b$ F*
hann føðir, varðar teir.

*F/A $B^b$ $B^b$/G*
Men elskar hann enn fuglarnar,

*C F*
meg elskar hann tó meir.

*A Dm*
Hann elskar meg, hann elskar meg,

*G C*
eg veit, hann elskar meg.

*F $B^b$ F/A $B^b$*
Hann elskar tann, sum lítil er,

*F/C C F*
og so hann elskar meg.

*Victor Danielsen*

*Sangurin er á fløguni „Í góðum lag", 1995, Mirjam og Victor Carlsen góvu út og á fløguni hjá Jóannes S. Hansen (Instrumentalt, klaver) „Við Løkin", 2009.*

## 4. Upp á tindar

*D C D*
Upp á tindar, gjøgnum dalar,

*A D*
upp á tindar, gjøgnum dalar,

*C D*
upp á tindar, gjøgnum dalar

*A D*
eg vil fylgja, har Jesus leiðir meg!

*G*
Eg vil fara, har hann leiðir,

*D*
eg vil fara, har hann leiðir,

*A D*
eg vil fylgja, har Jesus leiðis meg!

*G*
Eg vil fara, har hann leiðir,

*D*
eg vil fara, har hann leiðir,

*A D*
eg vil fylgja, har Jesus leiðir meg!

*Ókendur*

## 5. Eg eygu míni hevji upp til fjallanna

*Em Am*
Eg eygu míni hevji upp til fjallanna,

*$B^7$ Em*
hvaðani kemur mín hjálp?

*Am*
Hjálp mín frá Harranum kemur,

*$B^7$ Em*
skapara himmals og jarðar.

*$B^7$ Em*
Hann vil ikki lata fót tín snáva,

*$B^7$ Em*
vaktari tín vil ikki sova.

*$B^7$ Em*
Nei, ikki blundar og ikki svevur

*$B^7$ Em*
varðmaður Ísraels.

Harrin er vaktari tín,

*Am*
Harrin tín verndarskuggi

*Em B $B^7$*
við tína høgru hond.

*Em Am*
Um dagin skal sólin ei stinga teg,

*$B^7$ Em*
ella um náttina mánin.

$B^7$ Em
Frá øllum illum skal Harrin teg varða,

$B^7$ Em
hann tína sál skal varða.

$B^7$ Em
Tín útgang og inngang skal Harrin varða,

$B^7$ Em Am B
nú og um allar ævir: Amen!

Em Am $B^7$ E $E^7$
Nú og um allar ævir.

Am Em
Halleluja, halleluja,

$B^7$ Em $E^7$
halleluja, takk og lov!

Am Em
Halleluja, halleluja,

$B^7$ Em
Halleluja, amen.

*Sálmur 121*

# 6. Byggja Guds ríki

D
Byggja Guds ríki, byggja Guds ríki,

A
byggja Guds ríki her á jørð.

Dreingir, komið, hjálpið,

gentur, komið, hjálpið,

D
byggja Guds ríki her á jørð!

Byggja á orðið, byggja á orðið,
byggja á orðsins klettagrund.
Dreingir, komið, hjálpið,
gentur, komið, hjálpið,
byggja á orðsins klettagrund!

Vit skulu sigra, vit skulu sigra,
vit skulu sigra, er Guds orð.
Dreingir, komið, hjálpið,
gentur, komið, hjálpið,
byggja Guds ríki her á jørð!

*Ókendur*
*Johs. Mortensen*

# 7. Tað lítla ljós eg fekk

*F*
Tað lítla ljós eg fekk,

nú skal tað lýsa bjart.

*B*
Tað lítla ljós eg fekk,

*F*
nú skal tað lýsa bjart.

Tað lítla ljós eg fekk,

A Dm
nú skal tað lýsa bjart.

*F C*
Lýsa bjart, bjart, bjart,

*F*
lýsa bjart.

2. Eg seti tað ei undir skeppu, nei!
Nú skal tað lýsa bjart. x3
Lýsa bjart, bjart, bjart,
lýsa bjart.

3. Satan sløkkja vil, ei hann sleppur til. x3
Lýsa bjart, bjart, bjart,
lýsa bjart.

*Ókendur*

## 8. Eg vil vera ein viti

*D G/A D*
Eg vil vera ein viti,

*G D*
eg vil spreiða ljós.

*D G/A D*
Eg vil vera ein viti,

*Esus4 E7 Asus4*
hjá øðrum at seta út kós.

*Hm F#m/A*
Jesus livir, og hann er mín.

*G D*
Hann vegin vísir - meg kallar sín.

*Em C#m7 (B5) F# Hm*
Eg vil spreiða út ljósið hvønn dag

*D/A A7 D*
og æra frelsara mín.

*Hm F#m7*
Frelsari mín - eg sum títt barn

*G A*
vil tær tæna og æra teg.

*Hm F#m7*

Sum tíni børn vilja vit her

G A
saman dýrdargera títt navn.

Eg vil vera ein viti,
eg vil spreiða ljós.
Eg vil vera ein viti,
hjá øðrum at seta út kós.
Jesus livir og hann er mín.
Hann vegin vísir - meg kallar sín.
Eg vil spreiða út ljósið hvønn dag,
og æra frelsara mín.

*Ókendur*

## 9. Faðir, tú meg skapti

*G Am $D^7$ G*
1. *Faðir, tú meg skapti,*

*Am $D^7$ G*
*lívið tær eg gevi!*

*Am $D^7$ G*
*Send meg, nýt meg!*

2. *Jesus, tú meg frelsti,*
*lívið tær eg gevi!*
*Send meg, nýt meg!*

3. *Halgi andi, styrk meg,*
*lívið tær eg gevi!*
*Send meg, nýt meg!*

*Ókendur*
*Johs. Mortensen*

## 10. Í staðnum Betlehem

*Em*
Í staðnum Betlehem, har Jesus føddur var,

*Am $H^7$ Em*
har vildi eg sjálvur verið tá.

Men tað er nú ov seint at kunna gera tað,

*Am $H^7$ Em*
tí eingin hann nakrastaðni sær.

*Am Em*
Hvar er hann í dag, sigur tú?

*Am Em*
Hvar finni eg hansara bú?

Um tú vilt síggja hann, so trúgv tú orðum hans,

*Am $H^7$ Em*
so ein dag hann tú síggja kanst.

2. Í staðnum Nasaret, har Jesus drongur gekk,
har vildi eg sjálvur verið tá.
Men tað er nú ov seint at kunna gera tað,
tí eingin hann nakrastaðni sær.

*Jón Magnus Joensen*

*Sangurin er á fløguni "Í staðnum Nazaret", 1998, Heimamissiónsforlagið gav út.*

## 11. Bókin um Jesus er bók fyri meg

*C Am Dm G*
Bókin um Jesus er bók fyri meg,
*Dm G G7 C*
har møtir Gud mær og vísir mær veg.
*Am Em F C*
Bíblian hóskar til stór og til smá,
Am C G C
øll, sum tað vilja, har hjálp kunnu fá.

Mong ymisk menniskju hitti eg har,
eitt fyridømi hvør teirra er mær,
góður teim øllum er Gud, faðir vár,
hann er hin sami í dag sum í gjár.

Besta, sum Bíblian lærir meg um,
er, hvussu Jesus var mót børnunum;
signing hans breiðir seg um alla verð,
bróðir og frelsari hann okkum er.

Glaður eg lesi um himmalsins heim,
staðið hjá Gudi við gleði og gleim.
Hann hevur lovað, at hvør tann, sum trýr,
einaferð koma skal har, sum hann býr.

*Kari Sandvik*
*Johs. Mortensen*

## 12. Kennir tú hann

*F Gm7 C7 F*
Kennir tú hann, sum á vatninum gongur?
*Gm7 C7 F*
Kennir tú hann, sum ger vatnið til vín?
*Gm7 C7 F*
Kennir tú hann, á krossinum hongur,
*Gm7 C7 F*
og opnaði vegin til himmalin inn?

Bb F Gm$^7$
Lær hann at kenna, tí hann kennir teg,
*C C$^7$ F*
lær hann at kenna, hann vísir tær veg,
*F$^7$ /A Bb Bdim*
ja, tað er Jesus, sum frelsari er.
*F/C C F*
Hann heim til himmals teg ber.

Kennir tú hann, sum kann grøða tey sjúku?
hølt kunnu ganga og blind fáa sjón.
Kennir tú hann, sum reis upp frá deyða,
fór upp til himmals og livir í dag?

Kennir tú hann, sum er við allar dagar,
hann sum kann hjálpa, tá gøtan er trong?
Kennir tú hann, sum bønirnar hoyrir,
sum altíð er við tær í gleði og sorg?

*Olav Ruud*
*Jensina Hansen*
*Kristianna Johannesen*

## 13. Jesus elskar meg

*C G$^7$ C*
Jesus elskar meg, o ja,
*F C*
Bíblian mær sigur tað,
*G$^7$ C*
smábørn honum hoyra til,
*F C G$^7$ C*
fegin hann tey frelsa vil.

> *F*
> Ja, Jesus elskar,
> *C G$^7$*
> ja, Jesus elskar,
> *C F*
> ja, meg hann elskar,
> *C/G G$^7$ C*
> hans orð mær sigur tað.

Jesus elskar meg, hann bar
alla mína synd á sær;
opin er nú himmalin,
hvør, sum vil, kann sleppa inn.

Jesus elskar meg, hann skal
leiða meg so trygt og væl,
og til síðst hann lovar mær
inn í himmalin hjá sær.

Jesus, tak nú hjarta mítt,

ger tað heilt til tempul títt!
Tú, sum doyði fyri meg,
lat meg liva fyri teg!

*Anna B. Warner*
*V. Danielsen*

## 14. Eg vil telja stjørnurnar

Eg vil telja stjørnurnar,
nú, ið friður valdar,
men tað er so torført at
fáa allar taldar.

„Eg má brúka fingrarnar
at telja tær, eg síggi".
Men á sínum hondum hevur
Óli bara tíggju.

„Beinini! Ja, burtur við
bæði skógv og hosu
Eg má telja tærnar við",
sigur hann og brosar.

„Enn er ikki nóg mikið",
sigur hann og gánar.
„Tað var nógv, nógv lættari,
um eg taldi mánar!"

*Halfdan Rasmussen,*
*Alexandur Kristiansen týddi.*

## 15. Ja, um eg slapp á mánan

*D*
Ja, um eg slapp á mánan
*Em7 A7 D*
at spæla við eitt himmalský,
*D*
so hevði eg kunnað kagað
*Em7 A7 D0*
til børn í hvørjum bý.

Eg kundi sæð ein blámann
við trummustokk´og trummuskinn´,
ein gulan, rak kinesara,
sum hevði ein gulan pinn.

Eg sá tað stóra Russland,
har norðanætt er køld og strong,

á sledu sá eg skreiða
í kavanum ein drong.

Eg kundi sæði í Norra,
tá gentur løgdu lín á blik.
Í Grønlandi sást Petak,
hann sat og fekk sær spik.

Og í teim lítlu Føroyum
sá eg hvar kæra móðir fór,
men hon var ring at finna,
tí verðin er so stór.

Har er ein trúgva av londum,
og øll við børnum eins og eg.
Eg elski tey øll somul,
og tey øll elska meg.

Vit eru ein stór familja,
og liva vit í frið og ró
og ganga væl um knøttin,
er lagnan okkum góð.

*Halfdan Rasmussen*
*Andreas Andreasen týddi*

# Hentar slóðir

| | |
|---|---|
| **www.snar.fo** | Føroyski undirvísingarportalurin við eini ørgrynnu av tilfari til undirvísing, spølum og viðkomandi tíðinda stubbum. Um lærarin ynskir at arbeiða við sálmum, so er teldutøkt tilfar hjá Oliviu W. Hansen eisini á Snar. Heitið: Sálmar í fólkaskúlanum, miðdeild. |
| **www.books.google.com** | Alt upprunatilfar hjá Námi kann lesast í heilum líki á GoogleBooks ella Snar. |
| **www.folkakirkjan.fo** | Heimasíðan hjá føroysku fólkakirkjuni. Her finst Bíblian og sálmabókin teldutøk og upplýsingar um føroysku kirkjurnar umframt kirkjuligar reglur. |
| **www.folkekirken.dk** | Heimasíðan hjá donsku fólkakirkjuni. |
| **www.bibelselskabet.dk** | Gevur Bíbliur og bíbilskt tilfar út. |
| **www.emu.dk** | Danskur undirvísingarportalur. |
| **www.kristendom.dk** | |
| **www.religion.dk** | |
| **www.biblia.fo** | Bíblia, Jákup Dahl og Kristian Osvald Viderø týðing. |
| **www.biblian.fo** | Bíblian, Victor Danielsens týðing. |
| **www.google.com** | Gott leitiamboð. |
| **www.youtube.com** | Filmar. T.d. eru nógvir teknifilmar um bíbilskar persónar. |
| **www.skoletube.dk** | Filmar til og um undirvísing. |
| **www.wikipedia.com** | Her finnast nógvar viðkomandi upplýsingar, eisini á føroyskum máli. |